# Tilmæli

## Ferðavinnuútbúgving í Miðnám í Vestmanna

Mentamálaráðið

mai 2017

# Innihalds yvirlit

Kap. 1 Inngangur ..... 2
1.1 Arbeiðssetningur fyri ferðavinnuútbúgving í Miðnám í Vestmanna ..... 2
1.2 Arbeiðsháttur ..... 3
Kap. 2 Útbúgvingarleistur ..... 4
2.1 Ferðaleiðaraskeið ..... 4
Málbólkur ..... 4
Innihald ..... 4
Upptøka ..... 5
2.2 Ferðavinnuútbúgving ..... 5
Málbólkur ..... 5
Innihald ..... 5
Upptøka ..... 6
2.3 Tillaging av verandi miðnámsútbúgving ..... 7
Málbólkur ..... 7
Innihald ..... 7
Kap. 3 Hølisviðurskifti ..... 8
Kap. 4 Tilmælið ..... 8
4.1 Ferðaleiðaraskeið ..... 8
4.2 Ferðavinnuútbúgving 2018 ..... 9
4.3 Tillaging av verandi miðnámsútbúgving ..... 10
Kap. 5 Fíggjarligar avleiðingar ..... 10
5.1 Studningsmøguleikar ..... 11
Fylgiskjal 1 – Hagtøl ..... 12
Fylgiskjal 2 – Ferðaleiðaraskeiðið ..... 13
Fylgiskjal 3 – Íslendskar ferðavinnuútbúgvingar ..... 17

# Kap. 1 Inngangur

Ferðavinnan í Føroyum er í støðugum vøkstri og hevur verið tað tey seinastu árini. Hetta merkist alt árið, men serligt trýst er á ferðavinnuni í summarhálvuni. Í álitinum frá Fíggjarnevndini til fíggjarlógaruppskotið 2017, sigur meirilutin soleiðis: *"Ferðavinnan er í vøkstri, og meirilutin heldur, at tíðin er komin at seta í verk eina ferðavinnuútbúgving. Ásannast má, at búskaparvøksturin ikki er so týðiligur alla staðni í landinum, og meirilutin heldur tí, at ferðavinnuútbúgvingin skal setast á stovn og staðsetast á Tilfeingisskúlanum (Fiskivinnuskúlanum) í Vestmanna."*

Í ársfrágreiðingini 2016 hjá Visit Faroe Islands verður sagt, at umsetningurin í ferðavinnuni er vaksin frá at vera 416 mió. kr. í 2011 til 665 mió. kr. í 2015, ella ein vøkstur uppá 249 mió. kr. (sí fylgiskjal 1). Hetta merkir samstundis, at talið av ársverkum í ferðavinnuni økist. Sambært somu ársfrágreiðing verður sagt, at samlaða talið av ársverkum liggur um 470 ársverk fyri ta innkomandi ferðavinnuna. Hagstovan metir, at umleið 900 ársverk eru knýtt at kjarnuøkjunum hjá føroysku ferðavinnuni samlað sæð, tá ikki einans tann innkomandi ferðavinnan er roknað við.

Tað hevur týdning at menna førleikarnar hjá teimum, ið starvast í ferðavinnuni, og at støðið og góðskan á upplivingum er á høgum støði. Tað skulu eisini vera fleiri tilboð í ferðavinnuni hjá ferðafólki at fara til, og tí er neyðugt at birta áhuga fyri øllum tí ymiska, sum Føroyar hava at bjóða. Tí er stórur tørvur á at skipa fyri skeiðum og útbúgving fyri fólki, sum hava samband við ferðafólk í tí dagliga, og geva teimum eitt gott grundarlag og førleikar at byggja sítt virksemi á.

## 1.1 Arbeiðssetningur fyri ferðavinnuútbúgving í Miðnám í Vestmanna

Á løgtingsfíggjarlógini fyri 2017 er peningur játtaður til eina nýggja útbúgving í Miðnám í Vestmanna. Útbúgvingin skal vera innan ferðavinnu og er ein nýggj útbúgving her á landi.

Umhugsað hevur verið, hvussu henda útbúgving skal skipast innihaldsliga, um talan skal verða um eina gymnasiala útbúgving ella útbúgving á øðrum støði.

Landsstýriskvinnan hevur tí gjørt av at seta eina nevnd, ið umboðar allar partar innan ferðavinnuøkið, at koma við eini tilráðing um, hvussu best er at leggja eina slíka útbúgving til rættis, bæði viðvíkjandi innihaldi, útbúgvingarlongd, og hvørjir víðari møguleikar eru hjá teimum lesandi, tá tey eru liðug við útbúgvingina.

Arbeiðssetningurin hjá nevndini verður:

- At koma við einum tilmæli um, hvat innihaldið í útbúgvingini skal fata um

- hvørjar lærugreinar útbúgvingin skal fevna um, og á hvørjum torleikastigi A, B, C, D, E, ella F undirvísingin skal vera
- nær ávísu lærugreinarnar skulu takast inn í útbúgvingina
- um ástøðiligir partar av útbúgvingini kunnu gerast í samstarvi við verandi útbúgvingarstovnar
- møgulig starvsvenjingartíðarskeið hjá næmingunum
- ástøðiligir førleikar hjá næmingunum fyri at kunna koma inn á útbúgvingina
- útbúgvingarlongd

Harumframt skal metast um, hvørjar víðariútbúgvingarmøguleikar henda ferðavinnuútbúgvingin gevur atgongd til og framtíðar starvsvinnumøguleikar hjá fólki við hesi útbúgving.

Av tí at útbúgvingin skal byrja í august í ár, verður nevndin vinarligast biðin um at gera arbeiði sítt liðugt og handa landsstýriskvinnuni tilmæli sítt 1. apríl 2017. Seinni broytt til 1. mai 2017.

Í arbeiðsbólkinum hava sitið:

Eyðun Gaard, formaður, Yrkisdepilin
Oystein  Sørensen, fulltrúi, Mentamálaráðið
Jákup Andreasen, skúlastjóri, Miðnám í Vestmanna
Guðrið Højgaard, stjóri, Visit Faroe Islands
Jóhan Pauli Helgason, fulltrúi, Uttanríkis- og Vinnumálaráðið
Hilda Thomsen, tilmæli frá Glasir
Ingibjørg O. Petersen, skrivari, Mentamálaráðið

## 1.2 Arbeiðsháttur

Arbeiðsbólkurin hevur bert havt tveir mánaðir at koma við einum tilmæli, tí umráðandi er at byrja fyrireikandi arbeiðið skjótast gjørligt. Tilmælið er tí merkt av, at farið verður ikki niður í dýpdina við øllum evnum, men komið verður við tilráðingum um, hvat skilabest er at fara í gongd við beinanvegin, og hvat eigur at verða arbeitt víðari við. Umframt at hava havt fundir í arbeiðsbólkinum, hevur verið samskift við Ferðavinnufelagið í Vinnuhúsinum og Visit Tórshavn. Harumframt hava telefonsamrøður verið við áhugapartar frá vinnuni. Arbeiðsbólkurin hevur eisini havt fund við løgtingsmenninar, ið løgdu uppskotið fram í Fíggjarnevndini.

Tilmælið er bygt upp á tann hátt, at fyrst kemur uppskot um, hvussu ein møguligur útbúgvingarleistur kann skipast. Harnæst kemur tilmælið um, hvat eigur at gerast fyrst, og hvat skal arbeiðast víðari við. Tilmælið til aldursbólkin 16 ár og fram skal takast meira sum ein áheitan um at hugsa ferðavinnuna

inn í miðnámsskúlan sum heild, og kanska serliga yrkisútbúgvingarliga. Hetta er serliga eitt ynski frá Ferðavinnufelagnum.

# Kap. 2 Útbúgvingarleistur

## 2.1 Ferðaleiðaraskeið

Mett verður, at stórur tørvur er á at førleikamenna verandi ferðaleiðarar og at útbúgva nýggjar. Tað hevur verið sera avmarkað við tilboðum um at førleikamenna seg sum ferðaleiðari, og er tað tí sera avmarkað við ferðaleiðarum, sum vita nakað um Føroyar sum land og ferðavinnuland. Ferðaleiðaraskeiðið hevur bert eina ferð í nýggjari tíð verið útboðið á Skeiðsdeplinum í Tórshavn. Ætlanin er at byggja víðari uppá tað ferðaleiðaraskeiðið, sum var eitt góðkent yrkisskeið.

### Málbólkur

Málbólkurin fyri ferðaleiðaraskeiðið eru tey, sum longu virka innan ferðavinnu sum t.d. ferðaleiðarar, tænastufólk og hýruvognsførarar. Somuleiðis eru tey, ið kundu hugsað sær at arbeitt sum ferðaleiðari, eisini ein málbólkur. Privatar vinnur taka seg upp í ferðavinnuni, og fyri hesi starvsfólk, er ferðaleiðaraskeiðið somuleiðis ein góður møguleiki at nema sær servitan um Føroyar sum ferðamannaland.

### Innihald

Mælt verður til at útbúgva ferðaleiðarar so hesi fáa kunnleika innan ávís øki, t.d. fjallatúrar, busstúrar og sjótúrar. Frálæra eigur at verða givin í millum annað mikrofonteknikki, vinnulívi, gongd í haga, trygd, djóralívi, náttúruvernd, jarðfrøði, mentan, søgu, politikki og samfelag. Fyrsta hjálp, samskifti, búskapur og praktiskar venjingar eiga eisini at vera partur av skeiðinum. Víst verður annars til fylgiskjal 2 viðvíkjandi innihaldi í ferðaleiðaraskeiðinum.

Ferðaleiðaraskeiðið skal vera umleið 200 undirvísingartímar. Umleið 70 tímar skulu brúkast til praktiska undirvísing, vistarskeið og onnur skeið, t.d. busstúrar, fjallatúrar, túr undir Vestmannabjørgini umframt aðrar túrar. Hinir umleið 130 tímarnir skulu brúkast til ástøðiliga undirvísing.

Mælt verður til, at skeiðið byrjar fyrst í september 2017, og verður liðugt um hálvan apríl 2018. Skeiðið skal enda við próvtøku, har mett verður, um skeiðið er "staðið" ella "ikki staðið". Mælt verður til at skipa skeiðið sum kvøld- og vikuskiftisskeið.

Arbeiðsbólkurin heldur eisini, at tað skal bera til at luttaka partvís á skeiðinum, t.d. innan eitt ávíst økið. Eitt dømi um hetta er at skipa skeiðið í eitt ella fleiri modul á umleið 20 tímar, sum bara er

tænasturættað. Hesi styttri modulini eru ætlað fólki, sum taka ímóti ferðafólki lokalt t.d. á søvnum, gørðum ella móttøkufólki, hýruvognsførarum og øðrum. Ein annar møguleiki er at geva fólki møguleika at førleikamenna seg innan gongutúrar í náttúruni, soleiðis at høvi verður at nema sær serliga vitan um náttúrufyribrigdi, vernd, trygd, djóralív o.a.

Mett verður, at skeiðið eigur at verða bjóðað út 3. hvørt ár ella eftir tørvi.

### Upptøka

Treytin fyri upptøku er, at umsøkjarin hevur fylt 21 ár, tá ið skeiðið byrjar. Umsøkjarin skal hava góðan málsligan førleika í einum ella fleiri fremmandamálum á í minsta lagi B-stigi. Í ávísum føri kann upptøka harumframt fara fram við støði í einari upptøkusamrøðu.

## 2.2 Ferðavinnuútbúgving

Í okkara grannalondum finnast ymiskar útbúgvingar innan ferðavinnu á akademiskum støði, ið fleiri føroyingar eisini lesa á. Útbúgvingarmøguleikarnir innan ferðavinnu eru tí fleiri, men sambært føroysku ferðavinnuni er tørvur á einari føroyskari ferðavinnuútbúgving, har serligur dentur verður lagdur á praktiskar førleikar, íverksetan, menning, tænastu, sølu og marknaðarføring v.m., við støði í okkara egnu viðurskiftum.

Umframt at arbeiðsbólkurin hevur tosað við ferðavinnuna um útbúgvingartørvin í Føroyum, hevur arbeiðsbólkurin eisini hugt eftir, hvussu ferðavinnuútbúgvingar eru skipaðar í t.d. Íslandi og Danmark. Serliga tykjast tær íslendsku ferðavinnuútbúgvingarnar áhugaverdar, og hevur arbeiðsbólkurin tí serliga valt at hyggja nærri at teimum (sí fylgiskjal 3).

### Málbólkur

Málbólkurin fyri ferðavinnuútbúgvingina eru tey, ið hava áhuga í ferðavinnuni umframt tey, ið longu starvast innan vinnuna og vilja víðarimenna seg ella byrja egið virksemi. Tey lesandi skulu vera fylt 19 ár, tá útbúgvingin byrjar.

### Innihald

Arbeiðsbólkurin hevur umrøtt á hvørjum støði ferðavinnuútbúgvingin skal vera. Ein møguleiki, sum hevur verið umrøddur, er diplomstøðið. Í Danmark er ein diplomútbúgving innan ferðavinnu, har lestrartíðin er 1 ár sum fulltíðarlesandi, og svarar útbúgvingin til 60 ECTS. Tey flestu, sum hava lokið hesa útbúgving starvast á ferðamannastovum og hjá ferðafyriskiparum, meðan onnur eru sjálvstøðug ella hava onnur arbeiði innan ferðavinnu. Í Íslandi finnast styttri framhaldsútbúgvingar, har endamálið er at fyrireika tey lesandi til at arbeiða innan ferðavinnuna, og í hesum sambandi geva teimum

praktiskar førleikar. Tær ferðavinnuútbúgvingar, sum arbeiðsbólkurin hevur hugt eftir í Íslandi, taka vanliga 1 ár, umframt stutta starvsvenjing. Undirvíst verður vanliga um kvøldarnar.

Arbeiðsbólkurin metir ikki, at tað hevur hægstu raðfesting at útbúgvingin er á diplomstøði, í fyrsta umfari. Tó hevði tað verið ein fyrimunur fyri føroysku útbúgvingina, at hon bæði var førleikagevandi til arbeiði og víðari lestur. Arbeiðsbólkurin mælir til at seta á stovn eina 1 ára ferðavinnuútbúgving við stuttari starvsvenjing (uml. 4 vikur). Yvirskipaða endamálið við útbúgvingini skal vera at geva teimum lesandi praktiskar førleikar, sum kunnu brúkast beinleiðis í ferðavinnuni. Mælt verður til, at útbúgvingin verður skipað sum fulltíðarlestur, við undirvísing í dagtímunum. Undirvísingin kann m.a. fara fram í hesum evnum:

- Ferðavinna og ferðafólk sum vinnugrein
- Føroyar sum ferðamannaland
- Náttúruvernd
- Leiðsla og fyrisiting av fyritøku
- Marknaðarføring
- Søla og tænasta
- Trygd
- Nýmenning (innovatión)

Undirvísingin skal verða fjølbroytt og dentur skal leggjast á, at tey lesandi fáa vitan um náttúruna, hvussu vit verja náttúruna, søgu, floru, mentan, djóralív, vinnu, samfelag, list og bókmentir. Tey lesandi skulu fáa førleikar innan ráðlegging og fyriskipan av tiltøkum og túrum. Eisini er neyðugt at leggja dent á trygd og fyrstuhjálp, eins væl og neyðugt er at undirvísa í teimum handilsligu lærugreinunum so sum búskap, prísáseting, marknaðarføring, roknskap og vørumenning.

## Upptøka

Treytin fyri upptøku er, at umsøkjarin hevur lokið gymnasiala miðnámsútbúgving ella tilsvarandi. Nóg nógvar vinnuligar royndir kunnu eisini geva atgongd. Umsøkjarin skal hava málsligan førleika í einum ella fleiri fremmandamálum á í minsta lagi B-stigi. Í ávísum føri kann upptøka harumframt fara fram við støði í einari upptøkusamrøðu.

## 2.3 Tillaging av verandi miðnámsútbúgving

Vinnan spyr eftir ungdómi við áhuga fyri íverksetan, ið duga at síggja nýggjar vinnumøguleikar og fyri at fáa nýggjar vinnur í ferðavinnuni. Arbeiðsbólkurin heldur tað tí vera týdningarmikið at hava hetta í huganum í víðari menningini av miðnámsskúlaskipanini. Møguleikar áttu at verið fyri at gera tillagingar í verandi gymnasialu breytaskipan og yrkisnámi.

### Málbólkur

Málbólkurin eru tey ungu, ið koma úr fólkaskúla og søkja á miðnám.

### Innihald

At fingið ferðavinnu sum part av miðnámi, hevði verið við til at skapt áhuga fyri ferðavinnu tíðliga í útbúgvingarleiðini. Hetta er eitt ynski frá vinnuni, og hesum er arbeiðsbólkurin samdur í.

Arbeiðsbólkurin hevur tí umhugsað møguleikan at gera eina nýggja breyt í gymnasialu miðnámsskúlaskipanini í Vestmanna, men sambært Miðnám í Vestmanna verður trupult at fáa ferðavinnu inn sum eitt høvuðsevni í eini møguligari nýggjari breyt í skúlanum. Um tað er skilagott at gera eina nýggja breyt í gymnasialu breytaskipanini annars, vil arbeiðsbólkurin lata avvarðandi partar, myndugleika og ávísan skúla taka støðu til.

Ein annar leistur at fáa ferðavinnu sum part av gymnasialu miðnámsútbúgvingini kann vera at endurskoða námsætlanirnar fyri ávísar lærugreinar, so hesar eisini innihaldsliga fevna um ferðavinnu. Møguligt hevði verið at tillaga lærugreinina Tilfeingi A, sum er ein lærugrein á 3. ári í Miðnám í Vestmanna. Í lærugreinini eru 6 kjarnuøki ella valevni, hesi eru náttúrutilfeingi, aling, landbúnaður, fiskiskapur og veiða, framleiðsla úr náttúrutilfeingi og náttúrunýtsla, har ferða- og upplivingarvinna er partur av einum evni. Ferðavinna kundi verið eitt nýtt 7. kjarnuøki í hesi lærugrein. Skúlin velur hvørt ár 2 av kjarnuøkjunum til næmingarnar at arbeiða við. Ongin vissa er tí fyri, at ferðavinna sum kjarnuøkið ella evnið verður valt oftari enn 3. hvørt ár. Um námsætlanir skulu broytast, skulu tær vera klárar, tá søkjast skal á miðnám í 2018.

Sambært ferðavinnuni hevði tað verið skilagott at hugt at FHS útbúgvingini, ið inniheldur nógvar av teimum grundleggjandi lærugreinunum, sum tørvur er á í yrkinum. T.d. kundi lærugreinin innovatión verið kravd lærugrein. Tað skal ikki nógv broytast í FHS útbúgvingini soleiðis at hon eisini nøktaði tørvin hjá ferðavinnuni. Hvussu hetta skal gerast, vil arbeiðsbólkurin lata avvarðandi partar, ið varða av FHS útbúgvingini, meta um.

## Kap. 3 Hølisviðurskifti

Ætlanin er at byggja upp eina fulltíðar ferðavinnuútbúgving í Vestmanna, og hildið verður, at tað er skilagott at lata alt ferðavinnu skeiðs- og útbúgvingarvirksemið húsast sama stað. Møguleiki kann tá vera fyri einum framtíðar tvísporaðum útbúgvingar- og skeiðsleisti í skúlanum í Vestmanna. Vestmanna hevur nógv ferðafólk árliga, og tá hugsað verður um teir praktisku møguleikarnir, so er tað upplagt hjá skeiðsluttakarum og næmingum annars at samstarva við ferðavinnuna á útbúgvingarstaðnum. Hetta eigur at vera gagnnýtt til fyrimuns fyri báðar partar – lesandi og vinnu.

Um 1 ára ferðavinnuútbúgvingin skal skipast sum eitt dagundirvísingar tilboð, eru hølisviðurskiftini í Miðnám í Vestmanna ein trupulleiki. Í vanligari skúlatíð er bert eitt høli tøkt, sum í mesta lagi rúmar 12 næmingum. Skúlin hevur hartil eitt auditorium, ið rúmar 70 næmingum, har ljósviðurskifti tó gera, at hetta ikki er serliga væl egnað sum flokshøli. Um talan verður um kvøldundirvísing, eru hølir tøk.

## Kap. 4 Tilmælið

Í arbeiðsbólkinum hevur verið mett, at tað er mest skynsamt at byggja eina komandi ferðavinnuútbúgving upp í smáum, og tískil byrja við einum ferðaleiðaraskeiði. Ferðaleiðaraskeiðið skal byrja á heysti 2017, og eitt fólk eigur at verða sett skjótast gjørligt at fyrireika hetta arbeiðið.

Síðani verður mælt til, at arbeitt verður víðari við at menna eina ferðavinnuútbúgving, ið eftir ætlan skal byrja í august 2018. Henda skal vera tillagað føroysk viðurskifti, og í so stóran mun sum til ber, taka hædd fyri eftirspurninginum í vinnuni. Tíðarbilið at fyrireika eina útbúgving at byrja í heyst er ov stutt.

Á miðnámsskúlastøði verður mælt til at endurskoða ávísa námsætlan, soleiðis at ferðavinna verður ein partur av undirvísingini í Miðnám í Vestmanna. Umframt hetta verður mælt til, at ferðavinna verður hugsað inn í FHS støðisútbúgvingina.

### 4.1 Ferðaleiðaraskeið

Mælt verður við hesum til, at skipað verður fyri einum ferðaleiðaraskeiði, ið er ætlað verandi og nýggjum aktørum í ferðavinnuni, at byrja tíðliga í heyst 2017. Tað er tørvur á at hava førleikamennandi skeið til ferðaleiðarar, og til teirra, ið annars starvast innan tænastuyrkið í ferðavinnuni. Skeiðið eigur at geva neyðuga og holla vitan til tey, sum starvast, ella ynskja at starvast, innan yrkið. Umframt at førleikamenna verandi ferðaleiðarar og tænastufólk í vinnuni, er tað av týdningi at fáa nýtt fólk á ferðaleiðaraskeið, nú ferðavinnan er í vøkstri, og skeiðið eigur tískil eisini at vera ætlað óroyndum ferðaleiðarum. Somuleiðis kann skeiðið skipast soleiðis, at eitt tænastu rættað

modul á 20 tímar verður møguligt at taka hjá teimum, ið starvast í ferðavinnuni sum hýruvognsførarar, móttøkufólk og á lokalum søvnum ella gørðum.

Mælt verður til at byrja við kvøld- og vikuskiftisskeiðum. Skeiðið eigur at vera liðugt í apríl/mai 2018, so at nýútbúnu ferðaleiðararnir eru klárir til summarhálvuna. Skeiðið eigur at taka útgangsstøðið í áður havda ferðaleiðaraskeiði (sí fylgiskjal 2), og eigur at vera tillagað viðurskiftini í nýggja skeiðinum.

Ferðaleiðaraskeiðið eigur at vera útboðið 3. hvørt ár, ella eftir tørvi.

## 4.2 Ferðavinnuútbúgving 2018

Mælt verður við hesum til, at ein útbúgving innan ferðavinnu í Føroyum verður sett á stovn at byrja í august 2018. Útbúgvingin eigur at vera yrkisrættað og taka atlit til teir ymsu tørvirnar í ferðavinnuni, í samsvari við broyttu ferðamynstrini hjá ferðafólki í Føroyum. Útbúgvingin verður fjølbroytt og tekur støðið í serføroyskum viðurskiftum, umtóktum ferðavinnumálum í Føroyum, umframt búskapi, náttúruvernd, gongd í haga v.m. Endamálið er at geva teimum lesandi førleikar at arbeiða innan ferðavinnu. Talan er um fulltíðarútbúgving, sum tekur 1 ár, umframt stutta starvsvenjing.

Mælt verður til, at arbeitt verður víðari við ferðavinnuútbúgvingini við grundarlagi í tí, sum tørvur er mettur at vera á í Føroyum, og við íblástri úr íslendskum ferðavinnuútbúgvingar leisti (sí fylgiskjal 3). Hetta kann vera grundarlagið undir at menna føroysku útbúgvingina, og tillaga hana okkara egnu viðurskifti.

Í tilmælinum verður ikki tikið støða til, hvussu komandi ferðavinnuútbúgvingin neyvt skal síggja út innihaldsliga, og á hvørjum støði hon skal vera, men havast kann í huga, at útbúgvingin kann mennast við tíðini og røkka einum støði, sum svarar til eina diplom-útbúgving. Á henda hátt kann hon vera førleikagevandi til víðari lestur, umframt at vera yrkisrættað. Um tikið verður undir við at seta eina ferðavinnuútbúgving á stovn frá august 2018, verður arbeitt miðvíst víðari við hesi ætlan, og í tí sambandi eigur eitt fólk at verða sett at fyrireika hesa útbúgving. Arbeiðsbólkurin handan hetta tilmæli kann vera tilvísingarbólkur í tilgongdini at menna eina ferðavinnuútbúgving.

Um tikið verður undir við tilmælinum kemur Miðnám í Vestmanna at hava ábyrgdina av at menna hesa útbúgving saman við Mentamálaráðnum og ferðavinnuni annars.

### 4.3 Tillaging av verandi miðnámsútbúgving

Ferðavinnan hevur ávísan áhuga í at fáa ferðavinnuna sum lærugrein flættaða inn í miðnámsskúlaøkið. Arbeiðsbólkurin mælir ikki til at stovna eina nýggja breyt í gymnasialu miðnámsskúlaskipanini í Vestmanna. Um tað er skilagott at gera eina nýggja breyt í gymnasialu breytaskipanini annars, vil arbeiðsbólkurin lata avvarðandi partar, myndugleika og ávísan skúla taka støðu til.

Mælt verður heldur til at endurskoða námsætlanina til lærugreinina Tilfeingi A, sum er ein lærugrein á 3. ári í Miðnám í Vestmanna. Í lærugreinini eru 6 kjarnuøki, og fyri at fáa ferðavinnu sum part av Tilfeingi A, kann ferðavinna vera eitt sjálvstøðugt 7. kjarnuøki í lærugreinini. Skúlin velur hvørt ár 2 av kjarnuøkjunum til næmingarnar at arbeiða við. Um námsætlanir skulu broytast, skal tað arbeiðið verða liðugt, tá søkjast skal á miðnám í 2018.

Mælt verður somuleiðis til at endurskoða innihaldið í FHS útbúgvingini, ið inniheldur nógvar av teimum grundleggjandi lærugreinunum, sum tørvur er á í ferðavinnuyrkinum. Arbeiðsbólkurin mælir til, at innovatión verður kravd lærugrein í eini FHS útbúgving við denti á ferðavinnu, og at leggja størri vinnuligan vanga inn í FHS útbúgvingina, soleiðis at útbúgvingin verður førleikagevandi til vinnulívið.

## Kap. 5 Fíggjarligar avleiðingar

Tað er trupult at meta neyvt um kostnaðin av at fyrireika og seta í verk ferðaleiðaraskeiðið og ferðavinnuútbúgvingina, so fyrivarni má takast fyri, at kostnaðarætlanin er ein meting. Áðrenn ávikavist skeiðið og útbúgvingin verða sett í verk, krevst tí ein neyvari kostnaðarætlan.

Áðrenn ferðaleiðaraskeiðið kann fara í gongd í heyst, er neyðugt at fyrireika innihaldið og íverksetanina av skeiðinum. Til at gera hetta arbeiðið má skúlin fáa fólk uttanífrá at taka lut, og er tí nakað av kostnaði bundið at hesum. Í sambandi við skeiðsundirvísingina má skúlin somuleiðis fáa fólk uttanífrá, eins og aðrir rakstrarkostnaðir eisini eru í sambandi við skeiðið.

Áðrenn ferðavinnuútbúgvingin kann fara í gongd í august 2018, má hon fyrireikast innihaldsliga og bygnaðarliga. Eisini til hetta arbeiðið er neyðugt hjá skúlanum at fáa fólk uttanífrá at vera við, og er tí eisini ein ávísur kostnaður bundin at hesum fyrireikingararbeiðinum. Í sambandi við undirvísingina mugu undirvísarar setast í starv á skúlanum. Somuleiðis eru aðrir rakstrarkostnaðir eisini knýttir at ferðavinnuútbúgvingini.

Á løgtingsfíggjarlógini fyri 2017 er játtað 1 mió. kr. til at seta á stovn ferðavinnuútbúgving í Miðnám í Vestmanna. Játtanin verður brúkt til tær útreiðslurnar, sum verða av at fyrireika og seta í verk ferðaleiðaraskeiðið í 2017. Um tikið verður undir við at seta tilmælið í verk, má peningur eisini játtast til ferðaleiðaraskeið og ferðavinnuútbúgving í 2018 og 2019.

Yvirskipað kostnaðarætlan, fíggjarárini 2018 og 2019:

2018:

| | |
|---|---|
| Fyrireiking og gjøgnumføring (ferðaleiðaraskeið + ferðavinnuútbúgving): | 400.000 |
| Undirvísing v.m. (ferðaleiðaraskeið á vári 2018): | 350.000 |
| Undirvísing (ferðavinnuútbúgving á heysti 2018): | 400.000 |
| Aðrar útreiðslur: | 200.000 |
| **Tilsamans í 2018:** | **1.350.000** |

2019:

| | |
|---|---|
| Undirvísing + próvtøka (ferðavinnuútbúgving á vári 2019): | 650.000 |
| Aðrar útreiðslur: | 150.000 |
| **Tilsamans í 2019:** | **800.000** |

Um so er, at upptøka til ferðavinnuútbúgvingina verður aftur í august 2019, skulu kr. 400.000 leggjast afturat.

## 5.1 Studningsmøguleikar

Møguleiki skal vera hjá næmingum, sum taka 1 ára ferðavinnuútbúgving aftaná miðnám, at fáa útbúgvingarstuðul frá landinum.

# Fylgiskjal 1 – Hagtøl

## Søla til útlendsk ferðafólk fyri árini 2011 – 2015 í milliónum krónum.

| Blk. | | Ár | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 |
| 1 | Millumlandaflutningsfeløg, cruisevinna og ferðaskrivstovur | 254 | 308 | 333 | 361 | 399 |
| 2 | Gistingar og annað hotelvirksemi | 58 | 61 | 70 | 72 | 90 |
| 3 | Matstovur, matvøruhandlar og drykkjuvørur | 54 | 58 | 67 | 67 | 73 |
| 4 | Flutningur innanlands og leiga av bili | 21 | 22 | 26 | 28 | 45 |
| 5 | Upplivingar og annað virksemi | 18 | 29 | 30 | 31 | 40 |
| 6 | Klæðir og fótbúnaður | 7 | 8 | 10 | 10 | 11 |
| 7 | Onnur søla | 3 | 5 | 5 | 6 | 8 |
| | **Estimeraður umsetningur íalt** | **416** | **492** | **541** | **576** | **665** |
| | 95% Konfidensinterval + | 501 | 576 | 626 | 648 | 768 |
| | 95% Konfidensinterval - | 331 | 407 | 457 | 504 | 563 |

*Kelda: Hagstova Føroya, Búskaparligi týdningurin av útlendsku ferðafólkunum*

Myndin er úr ársfrágreiðingini hjá Visit Faroe Islands, 2016.

# Fylgiskjal 2 – Ferðaleiðaraskeiðið

*Yrkisskeið nr. 1/06*

*Heiti: Ferðaleiðari*

*Góðkent av Yrkisútbúgvingarráðnum*

*(dagf.)*

*1. Endamál og bygnaður*

*Endamál: Skeiðið hevur til endamáls at útbúgva ferðaleiðarar, sum við støði í breiðari almennari og serligari vitan um Føroyar sum ferðamannaland - herundir um náttúru, landafrøði, søgu, mál, mentan, samfelagsviðurskifti og føroysk sereyðkenni - kunna bera fram hesa vitan til ymiskar ferðamannabólkar á einum ella fleiri fremmandamálum.*

Bygnaður: Skeiðini skulu í mestan mun skipast sum skiftisútbúgving og fara fram í skeiðsrøðum. Verkligu og ástøðiligu partarnir fata uml. 140 tímar tilsamans. Undirvísingin verður skipað sum floksundirvísing, bólkaarbeiði, lutaleikur og námsferðir. Ávís skeið kunnu eisini skipast sum vistarskeið á útferðastøðum ella aðrar staðir í landinum. Skeiðini verða boðin út eftir tørvi og fara partvís fram á góðkendum útbúgvingarstaði og partvíst á útferðarstøðum. Skeiðini enda við próvtøku.

## *2. Málbólkur og torleikastig*

*Treytin fyri upptøku er, at umsøkjarin*

*a) hevur fylt 21 ár, tá ið skeiðini byrja*
*b) hevur málsligan førleika í einum ella fleiri fremmandamálum á í minsta lagi B-stigi*
*c) í ávísum føri kann upptøka harumframt fara fram við støði í einari upptøkusamrøðu*

3. Undirvísingarinnihaldið

*Skeiðini eru býtt upp í 4 høvuðstættir. (*Sí sundurgreiningina í fylgiskjali 1*).*

*1) almenn vitan*
*2) sergreinir*
*3) undirvísing og verkligar royndir í hjágreinum*
*4) undirvísing og roynd í tekniskum evnum og tólum*

4. Skeiðsskipan

*1) Skeiðslongd:*

*Undirvísingin skal fara fram í einari vetrarhálvu og verða skipað í vikumodulum við skifti millum ástøðiligt og verkligt innihald. Undirvísingin kann eisini skipast sum sjálvlestur (*Sí sundurgreiningina í fylgiskjali 2*). Undirvíst verður 1 x 5 tímar um vikuna. Undirvísingin fer í høvuðsheitum fram sum kvøldundirvísing, men*

*kann eisini fara fram í vikuskiftum. Fjórðu hvørja viku er undirvísingin praktiskar royndir í ástøðiligum og verkligum evnum.*

*Verður næmingur tikin upp til skeiðið sum sjálvlesandi, skal hann fara upp til próvtøku eftir ásetingunum í fylgiskjali 3 í seinasta lagi 1 ár eftir upptøkuna.*

*2) Útbúgvingarstað:*

*Skeiðsdepilin á Marknagili.*

*3) Kostnaður:*

*Útbúgvingarstaðið ásetir luttøkukostnaðin, sum yrkisnevndin skal góðkenna.*

*4) Undirvísarar/Próvdómarar:*

*Undirvísarar á Skeiðsdeplinum, sum yrkisnevndin skal góðkenna. Próvdómarar skulu í minsta lagi hava 5 ára royndir sum ferðaleiðarar ella 5 ára royndir í ferðavinnu.*

*5) Dømiætlan:*
*Hildin verður ein skrivlig og ein munnlig próvtøka, sum fer fram ta seinastu undirvísingarvikuna. Kravið fyri at standa skeiðini er, at próvtakarin hevur staðið bæði munnligu og skrivligu próvtøkuna.*

*Próvtøkan er býtt upp í ein ástøðiligan part og ein verkligan part. Fyri at kunna luttaka í tí verkliga partinum, skal næmingur hava staðið tann ástøðiliga partin.*

*Fyri at fáa próvskjal sum ferðaleiðari, skal næmingur - áðrenn próvtøkan fer fram - hava lokið prógv í fyrstuhjálp av góðkendum undirvísara.*

*Próvskjal verður útflýggjað av útbúgvingarstaðnum.*

*6) Avriksflutningur:*
*Yrkisnevndin tekur støðu til, um útbúgvingin kann veita avriksflutning í einari yrkisútbúgving innan ferðavinnu.*

*7) Møtiskylda:*

*Næmingar hava møtikyldu. Undantikin eru tey, sum eru sjálvlesandi ella sum hava í minsta lagi 2 ára royndir sum ferðaleiðarar.*

*8) Yrkisnevnd:*
*Umframt føstu limirnar í yrkisnevndini, velur ferðaleiðaravinnan 1 lim og ferðasmiðvinnan 1 lim.*

5. Aðrar ásetingar
*Omanfyri ásettu reglur skulu útgreinast í skeiðsreglum sambært § 5 í kunngerðini, og skulu skeiðsreglurnar v.m. verða góðkendar av yrkisnevndini, áðrenn góðkenningarskjalið verður útskrivað.*

Fylgiskjal 1

Sundurgreining av innihaldinum (samanber ad. 3)

*Ad. 3.1 er 3 x 20 tímar og fatar um ástøði í almennari vitan í hesum evnum:*

a) Mál og mentan
Eldra søgan, kvæðini, dansurin, ullin, báturin, knívsmíð, skaldskapur, myndlist, tónleik, sjónleik og matarmentan.

b) Fornminni og siðsøga
Búsetingarsøga, íbúgvar, trúarlív, byggihættir, landslag, náttúra og norrøn gudalæra.

c) Søga og samfelagsviðurskifti
Politiska og búskaparliga søgan, søguligar hendingar og nútíðarsamfelagsviðurskifti, heimastýrislógin, flaggið (Merkið), sambandið við Danmark, Norðurlond og ES, vinnulívið, herundir orka og politiska skipanin (løgting og landsstýri).

d) Jarðfrøði, djór og plantur
Jarðfrøði (eldgos, fláirnar, kol, gosmyrjan, innskot, grót og steinar), djór (fuglur, grind, fiskur og seyðahald) og plantur.

Ad. 3.2 er 20 tímar og fatar um ástøði í minst 1 av hesum sergreinum:

*a) Kirkjur, standmyndir o.l.*
*b) Søvn og søgulig fornminni*
*c) Útferðir (býarrundtúrar, busstúrar, fjallatúrar, bátaferðir)*

Ad. 3.3 er 2 x 20 tímar og fatar um undirvísing og praktiskar royndir í hesum hjágreinum:

a) Ferðaleiðarin sum tænastuveitari
- *Fyrireiking og fremjan av túri*
- *Loysn av ymsum trupulleikum*

b) Ferðafólkið sum kundi
- *Hvussu kunnu ynskini hjá kundanum nøktast*
- *Samskifti við ferðafólk*
- *Hóskandi atburður mótvegis einstaka ferðafólkinum*

*c) Fyrireiking av útferðum*
- Leggja til rættis býarrundtúrar, busstúrar, fjallatúrar, bátaferðir
- Vitjan á søvnum, søguligum fornminnum og útsýnissstøðum

*d) Fremjan av útferðum*
- Trygdarviðurskifti á túrum
- Galdandi tryggingarreglur o.l.

Ad. 3.4 er 20 tímar og fatar um undirvísing og royndir í tekniskum evnum og tólum

a) Mikrofon- og ræddarlæra
   - *Ræddarvenjing*
   - *Taluteknikkur*
   - *Venjingar í at nýta mikrofon.*

b) Lestrarteknikkur
   - *Snarlesing*
   - *Yvirlitslesing*
   - *Minnisfremjandi innlæringarhættir*

# Fylgiskjal 3 – Íslendskar ferðavinnuútbúgvingar

**Ferðamálaskólinn í Kópavági www.mk.is**

Endamálið er at fyrireika tey lesandi til at arbeiða innan ferðavinnu ella til víðari lestur. Útbúgvingin tekur 1 ár, við 36 einingar (ects)[1] undirvísing, og 15 einingar (ects) í starvsvenjing innan ferðavinnuyrkið. Møguleiki er fyri at taka útbúgvingina hálva tíð yvir 2 ár.

Upptøka: Umsøkjarar skulu vera 20 ár og hava lokið miðnám, ella aðra samsvarandi útbúgving. Umsøkjarar, sum eru 25 ár, og sum hava viðkomandi vinnuliga bakgrund, men ikki lokið miðnám, kunnu eisini søkja um upptøku. Góður málsligur førleiki krevst á íslendskum og enskum.

Undirvísing er um kvøldið, mánadag-hósdag kl. 16:30-21:50. Útferðir og annað kann vera uttanfyri vanliga skúlatíð.

3 mánað starvsvenjing innan fyritøku í ferðavinnuni er krav fyri at standa útbúgvingina. Tey lesandi kunnu vera í starvsvenjing, samstundis sum tey lesa. Royndir innan ferðavinnuyrkið kann geva merit fyri starvsvenjing. Uppgávur og próvtøkur eru í skúlatíðini. Próvtøkur kunnu vera skrivligar, munnligar ella sum smærri royndir í útbúgvingartíðini.

Gjald: Áleið 25.000 føroyskar krónur fyri 1 ár. Onnur gjøld eru galdandi teimum, sum ikki eru fulltíðarlesandi. Tilfar er ikki íroknað skúlagjaldinum. Stuðulsstovnurin letur lestrarlán til tey lesandi. Á útbúgvingini eru ymisk valfak, til onkur krevst luttøkugjald.

Lærugreinar

- 4 ects: Enskt mál fyri ferðandi, Ísland sum ferðaland (geografi)
- 3 ects: Ástøði innan ferðavinnu, Onnur lond sum ferðalond (geografi), Marknaðarføring innan ferðavinnu, Event management (ráðstevnur, fundir, hátíðarhald o.a.), Umhvørvi og ferðavinna, Upplýsingar tøkni innan ferðavinnu
- 2 ects: Handil og rakstur, Leiðsla, Samskifti
- 1 ects: Fyrstu hjálp
- 2 Valfak (annað skal veljast) - Framleiðsla og matgerð ella Ferðaseðlar og booking

15 ects (3 mðr) starvsvenjing. Tilsamans 51 ects. Til samanberingar eru 60 ects á einum lestrarári á hægri útbúgvingum (universitet)

[1] 1 eining er 18-24 arbeiðstímar, sum svarar umleið til 1 ECTS.

**Leiðsøguskólinn í Kópavági www.mk.is**

Útbúgvingin er ein 1 ára praktisk útbúgving, sum tekur atlit til teir ymsu tørvirnar í ferðavinnuni, í samsvari við tey broyttu ferðamynstrini hjá ferðafólki. Útbúgvingin er fjølbroytt og tekur støðið í íslendsku náttúruni, søgu, flora, mentan, djóralív, vinnu, samfelag, list og bókmentum. Undirvíst verður innan tær stóru turist-attraktiónirnar í Íslandi, náttúruvakrar túrar, náttúruvernd, umhvørvið og tøkni. Lærarar og undirvísarar eru serfrøðingar á økinum.

Upptøka: Fyri at sleppa inn á útbúgvingina, skal næmingurin vera fyltur 21 ár við skúlaársbyrjan. Miðnáms- ella líknandi prógv krevst. Tilsvarandi vinnuligar royndir kunnu eisini geva atgongd. Góður málførleiki á íslendskum og enskum krevst. Tey lesandi skulu standa eina munnliga roynd í fremmanda máli í sambandi við upptøku.

Undirvísingin er 3 kvøld um vikuna, kl. 16:40-21:20, frá august-mai. Onkur vikuskifti verður skipað fyri undirvísingar túrum, í náttúruni ella aðrastaðni (6-7 ferðir um árið).

Gjald: 28.000 føroyskar krónur fyri 1 ár. Lesandi, sum ikki lesa fullatíð, gjalda fyri hvørt skeið sær.

Høvuðslærugreinar á ferðaleiðaraútbúgving:

- 1 ects: Vinnumøguleikar, Djóralív, Ferðavinna, Plantur og umhvørvisvernd, Íslendska samfelagið, Søga Íslands, Fyrstuhjálp
- 2 ects: Bókmentir og list, Jarðfrøði, Ferðaleiðara tøkni og samskifti, Málskeið, Starvsvenjing (ferðaleiðari í verki)

Tey lesandi velja eina av trimum leiðum: Alment ferðaleiðaraskeið, Gongutúrar/vandring, ella Virksemi (aktivitet) og stuttleiki

Alment ferðaleiðaraskeið er 16 ects: ferðavinna, mál, økislýsingar, jarðfrøðiligar økislýsingar, starvsvenjing

Gongutúrar/vandring er 18 ects: Ferðavinna, samskipan og samskifti, økislýsingar, fyrstuhjálp II, veður – jøklar, fjallakunnleiki, starvsvenjing

Virksemi (aktivitet) og stuttleiki er 16 ects: stuttleikaferðir, ferðavinna, samskipan og samskifti, fyrstuhjálp II, økislýsingar, veður – jøklar, trygd – trygging – loyvir

**Starfsnám í ferðamálafræðum**

1 ára yrkisútbúgving innan ferðavinnu: 48 ects.

Endamálið við skeiðnum er at geva teimum lesandi praktiska læru innan ferðavinnu. Eftir skeiðið kann næmingurin starvast innan ferðavinnuyrkið. Skeiðið gevur eina umfatandi útbúgving innan ferðavinnu.

Upptøka: 20 ár, og hava staðið eina viðkomandi støðisútbúgving, miðnámsútbúgving ella líknandi.

Útbúgvingin tekur 1 ár, sum eru 2 lestrarhálvur í skúla og 3 mðr. í starvsvenjing.

Serøki, 33 ects.

4 ects: Ferðavinnu enskt, Ferðafrøði og ferðavinna - ástøði og verkligt, Marknaðarføring innan ferðavinnu, Geografi Ísland

3 ects: Geografi uttanlands 3 ects, Rakstur og fyrisiting, Umhvørvið og ferðavinna, KT innan ferðavinnu, Samskifti og samskipan

2 ects: Event (ráðstevnur og fundir)

Vallærugreinar 3 ects

Ferðaseðlar og booking 3 ects, Matgerð 3 ects, Telda og tøkni 3 ects

Krav: Starvsvenjing í 3 mðr. 12 ects

**Samandráttur av lærugreinum**

**4 ects:**

- Enskt mál fyri ferðandi, Ísland sum ferðaland (geografi), geografi innanlands, marknaðarføring innan ferðavinnu

**3 ects:**

- Ástøði innan ferðavinnu, onnur lond sum ferðalond (geografi), geografi uttanlands, marknaðarføring innan ferðavinnu, event management (ráðstevnur, fundir, hátíðarhald o.a.), umhvørvi og ferðavinna, upplýsingar tøkni innan ferðavinnu, rakstur og fyrisiting

**2 ects:**

- Handil og rakstur, leiðsla, samskifti, bókmentir og list, jarðfrøði, ferðaleiðara tøkni og samskifti, málskeið, event (ráðstevnur og fundir), starvsvenjing (ferðaleiðari í verki)

**1 ects:**

- Vinnumøguleikar, djóralív, ferðavinna, plantur og umhvørvisvernd, íslendska samfelagið, søga Íslands, fyrstu hjálp